

*Hilmar Johannesen gjørdi tað sum flestu smádreingir droyma um. Hann koyrdi bæði brandbil og politibil*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Hilmar koyrdi brandbil og politibil

Í Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.05 er ein samrøðu við Hilmar Johannesen í Havn, sum umframt at hava arbeitt sum bilmekanikari, eisini hevur verið brandmaður og eykapolitistur.

Hilmar fór í 1956 í læru sum bilmekanikari á bilverkstaðnum hjá Sverra Djurhuus, sum tá var í Tjarnastovu í Janstovugøtu.

Í 1967 bleiv Hilmar knýttur at Tórshavnar Sløkkiliði. Umframt at vera brandmaður tók hann í 1984 við sum eykapolitistur á Politistøðini í Havn.



*Mest seldi persónbilur í Danmark í 2009 var Toyota Avensis*

## Avensis mest seldi bilur Danmark

Felagsskapurin De Danske Bilimportører hevur almannakunngjørt søluna bilum í Danmark í 2009.

Mest seldi persónbilur í Danmark í 2009 var Toyota Avensis við 3.265 bilum. Nummar tvey var Toyota Aygo við 3.225 bilum og nummar trý gjørdist Ford Fiesta við 3.016 bilum.

Samanlagt var Ford mest selda bilmerki, og Peugeot seldi samanlagt mest persónbilar.

Tað sermerkta við hesum er, at ein so stórur bilur sum Toyota Avensis verður mest seldi bilur í Danmark framman fyri fleiri minni bilar sum vanliga liggja á odda sum mest seldu bilar, verður sagt frá felagsskapinum De Danske Bilimportører.



*Starvsfólkini á verksmiðjuni í Tychy í Pólandi hátíðarhalda at 1.500.000 Fiat Panda eru framleiddir*

## Hálvonnur millión Fiat Panda

Herfyri kundi Fiat hátíðarhalda at 1.500.000 Fiat Panda vóru framleiddir á verksmiðjuni í Tychy í Pólandi. Núverandi Fiat Panda, sum einans verður gjørdur í Pólandi, kom á marknaðin 2003, og var kosin Car of the Year 2004 í Evropa.

Umframt Panda verða eisini Fiat 500 og Ford Ka framleiddir á verksmiðjuni í Tychy í Pólandi.

*Kelda: Frisk fra Fiat*



*Sveisiski fleirmillióningurin koyrdi í sínum Ferrari Testarossa, tá hann varð tikin fyri at koyra við ov nógvari ferð*

## Ferrari eigari 1,5 mill í bót

Ein sveisiskur fleirmillióningur, sum herfyri koyrdi við eini ferð upp á 137 km/t gjøgnum eina bygd í Sveis við sínum Ferrari Testarossa, fekk eina bót upp á 299.000 sveisarfrankar, ið svarar til 1,5 milliónir krónur í okkara peningi.

Í Sveis er tað soleiðis, at fólk fáa bøtur í mun til virði av teirra ognum, og hesin Ferrari eigarin fekk eina bót, sum svarar til eitt prosent av virðinum av hansara ognum.